# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Misbrúka Bíbliu á Løgtingi!

Við jøvnum millumbili stingur orðaskiftið seg upp um spurningin: politikk og átrúnað. Hetta er fyri mong ein sera viðkomandi spurningur, tí hvar er markið millum politikk og átrúnað, er nakað mark osfr? Neyvan finnast nøkur evni og viðurskifti, har tað eru so nógvar ymsar meiningar sum júst, tá tað snýr seg um politikk og átrúnað.

Hesir spurningar seta javnan dagsskránna úti í heimi, antin í orðaskifti ella á stríðsvølli. Hvussu er stætt her hjá okkum. Hvussu bera vit okkum at, tá tað snýr seg um politikk og átrúnað. Hvussu megna vit at halda hesi atskild – hvussu nógv tvinna vit hesi saman! Sosialurin fer í greinum í komandi vikuskiftisbløðum at viðgera m.a. hetta evnið.

Hendingarnar á tingi í seinastuni eru dømi um, at politikkur og átrúnaður verða tvinnað saman, í ólukkumát. Tað kenst ódámligt, tá ávísir politikarar brúka tingsins røðarapall til prædikustól, har Bíblian er bæði skjøldur og spjótspíssur í samfelagsliga orðaskiftinum. Sjálvandi er tað upp til okkara fólkavaldu at hava sína persónligu trúgv. Men tá eins egna persónliga tulking av Bíbliuni verður brúkt til at niðurgera onnur og teirra meiningar og livihátt, eigur at verða talað at. Bíblian er nevniliga ikki ein bók, sum ávísir flokkar og politikarar hava fingið patent uppá at tulka. Vit hava øll okkara hjartamál, tá vit lesa og umrøða hesa góðu bók. Vit raðfesta ymiskt.

Andsøgnina finna vit tó, tá ávísir politikarar vilja gera sínar persónligu tulkingar og raðfestingar úr Bíbliuni til lóg – til einasta sannleikan. Tá hesir t.d. geva seg út fyri at vera Jesu lærusveinar og í sama andadrátti tveita miðaldarligar tulkingar av Bíbliuni í høvdið á øðrum teir umrøða sum vantrúgvandi og eitt nú brúka bókstavilig sitat úr Gamla Testamenti í sínum skjaldramerki, so tala vit at. Tit hava ikki patent uppá hvørki Jesus ella einastu røttu tulkingina av Bíbliuni. Tá tit loyva tykkum at brúka – misbrúka - Jesunavnið í tykkara politisku røðum á tingi, hví gloyma tit hesar so týðandi áheitanir hansara: "Farið innar í kamar tykkara og biðið - Vendið hin hjálkan til - Gerið figgindar tykkara til tykkara vinir. Dømið ikki. Fyrigevið."

Føroyingar hava altíð havt eitt skilagott og náttúrligt forhold til sín Gud og til Bíbliuna. Tað er hetta tit, sum kalla tykkum rætttrúgvandi, eru við at forkoma – eitt nú við tykkara afturvendandi misbrúki av Jesuspápa og Bíbliuni á eitt nú Føroya Løgtingi. Tit skuldu skammað tykkum.

**Sosialurin**

## William Heinesen, gev okkum eitt tekin!

RÓI EGHOLM



Ein av okkara stóru tónleikarum, Teitur Lassen, hevur á síni nýggju fløgu skrivað sangin Luis Luis, har hann á ein sera hugnaligan hátt heitir á gamla jazzfaðirin, Louis Armstrong, at hann skal rísa upp aftur og arbeiða víðari við sínum tónleiki og soleiðis ríka um heimin.

Okkara størsti rithøvundur ígjøgnum tíðirnar, William Heinesen, megnaði at verða fagnaður kring allan heim fyri sítt framúrskarandi virki innan bókmentir. Hann dugdi betur enn nakar at lýsa lívið í pinkusamfelagnum í Útnorðri. Hann lýsti nágreiniliga, hvørjar kreftir eru galdandi í hesum lítla samfelagnum, tó uttan at heildarmyndin kámaðist.

Hann sá stórt í tí reina persóninum, sum dugdi at liva egið lív og sum eisini kendi sínar sosialu borgaraskyldur. Ofta eru hesir persónar lýstir sum einfaldir persónar, sum varðveittu gomlu siðmentanina, har vanligi kristindómurin við næstrakærleika fremst setti sítt dám á gerandisdagin og lívið.

Hinvegin hevði hann at persónum, sum uttan fyrilit tóku pettir úr bíbliuni fyri á tann hátt at seta saman ein tilevnaðan kristindóm, sum so skuldi brúkast sum amboð at vinna sær egið vald í samfelagnum. Hesir persónar virkaðu ofta sum prædikumenn í samkomum og teir lýstu oftast Várharra sum ein Guð, sum als ongan næstrakærleika átti, men tvørturímóti bara kendi til kol og brand, revsing, fordøming, til Sodoma og Gomorra o. s. fr. Hesir somu prædikumenn sótu ofta í høgum størvum og misbrúktu tíverri hesa av teimum útholaðu bíbliu til at ávirka avgerðirnar, soleiðis at tær blivu til teirra fyrimun og ikki neyðturviliga til gagns fyri heildina. Hesir persónar verða tí als ikki lýstir sum nakrir einglar, men heldur sum sjálvsøknir syndarar, sum nýta bíbliuna sum skjøldur.

Tað er júst hesa óreinu lívsførslu, hesa niðran av Várharra, sum William dugdi so væl at lýsa og sum hann gjørdist so kendur fyri, bæði her heima, men ikki minni uttan fyri landoddarnar.

Tí fari eg nú – eins og Teitur heitir á Luis – at heita á William Heinesen um at koma aftur, at gera sítt til at halda føroyska samfelagnum á virðiligari kós, eins og hann gjørdi øll síni skrivandi ár.

## Óli skyldar mær eina treytaleysa umbering

DAN R. PETERSEN



Fyrst skal eg takka øllum teim mongu sjómonnum, sum hesi árini eg havi siglt, hava heitt á meg um at stilla upp til formansvalið í Fiskimannafelagnum. Somuleiðis takki eg teimum manningum og sóknarformonnum, sum við síni undirskrift hava stillað meg upp. Eg taki hetta sum ein stóran heiður.

Eg umhugsaði hetta gjølla, sera gjølla. Umborð á skipi er stór ónøgd við Fiskimannafelagið. Eg hevði ikki tikið hesa avgerð, kendi eg ikki stemningin umborð mótvegis felagnum, og var eg ikki vísur í at fella sitandi formann.

Fyri ordan skyld ringdi eg til Óla og boðaði honum frá hesi avgerð, samstundis sum eg boðaði honum frá, at eg ikki ætlaði at vera persónligur, men at eg sjálvandi hevði nøkur kritikpunkt, eg fór at føra fram, mál eg uttan úrslit havi ført fram á fundi í Fiskimannafelagnum.

Síðani sendir Mortan Berjastein sóknarformaður eitt tíðindaskriv og boðar frá uppstilling. Næsta, sum hendir, er, at Óli kemur sum eitt óløgi í Útvarpið og sigur meg skuldseta hann fyri at vera í lummanum á reiðarunum. Hóast hetta er vanlig hugsan millum sjómenn, havi eg ikki sagt hetta. Einasta, sum er komið fram, tá Óli missir fatningin, er eitt sakligt tíðindaskriv frá Mortani, sum eg onga ábyrgd havi av og ein sera hampilig grein, sum Randi Jacobsen hevur skrivað í Dimmalætting. Hví Óli er í øðini kunnu vit bara gita um. Eg leggi onki í,um Óli er óður ella góður, men kemur hann ikki við einari treytaleysari umbering, so hevur hann sjálvur lagt støði.

Niðurteljingin til vaktarskiftið á Fiskimannafelagnum er byrjað.

## Rættleiðing

FINN JENSEN



Hetta er ein lítil rættleiðing til teir nýkonservativu politikararnar í Føroyum.

Liberalisma merkir **frí kapping,** ikki **frí** ***happing***.

So skuldi hendan misskiljing verið beind av vegnum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.